## Samráðingarnevndin mannað

Í Íslandi hevur Øssur Skarpheðinsson, uttanríkisráðharri, nú mannað samráðingarnevndina, sum skal samráðast við Evropasaveldið um treytirnar fyri íslendskum limaskapi har. Samráðingarleiðari verður Stefán Haukur Jóhannesson, sendiharri, sum mannar nevndina saman við sjey øðrum nevndarlimum umframt formonnunum í tíggju undirnevndum. Á odda fyri tí løgfrøðiliga partinum standa Björg Thorarensen, leiðari á løgfrøðideildini á Háskóla Íslands, og Þorsteinn Gunnarsson, fyrrverandi rektari á Háskólanum á Akureyri.



## SAS stórt hall

Tað gongst sera illa hjá skandinaviska flogfelagnum SAs at venda teirri fíggjarligu gongdini. Felagið kunngjørdi í morgun roknskapin fyri tíggju teir fyrstu mánaðirnar í ár, og á niðastu reglu sæst, at hetta tíðarskeiðið gav raksturin næstan 1.650 milliónir svenskar krónur í halli. Kortini er úrslitið betur, enn marknaðurin hevði roknað við, skrivar Ritzau. Síðani í gjár hevur leiðslan í SAS tingast við umboð fyri flogternurnar og flogskiparanar um eina spariætlan. Partarnir hava tingast alla nátt, men enn er eingin semja fingin.

# Kommunurnar bløða




**Avrokningin av partafelagsskattinum líkist einum skrædli hjá føroysku kommununum. Avrokningin til kommunurnar er knappar 87 milliónir minni í ár, enn hon var í fjør**

BÚSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinastu skattahagtølini frá Taks staðfesta fallið, sum føroyski búskapurin framhaldandi er í.

Og tað eru serliga kommunurnar, sum eru hart raktar. Fyrstu 10 mánaðirnar í ár er kommunala skattainntøkan fyri persónsskatt minkað úr 1.098 mió kr. í 1.064 mió kr. Minkingin er nærum 35 milliónir, sum svara til eitt fall upp á 3,15 %.

Í sama tíðarskeiðið eru inntøkurnar hjá landinum eisini minkaðar – men tó langt ífrá í sama mun. Føroyingar hava fyrstu 10 mánaðirnar í ár rindað 1.136 mió kr. í landsskatti, og tað eru knappar 17 milliónir minni enn í fjør. Eitt fall, sum svarar til 1,47%.

Skattahagtølini, sum Taks sendir út, fevna bert um persónsskatt. Umframt minkingina í hesum er partafelagsskatturin í 2009 munandi lægri enn í 2008. Samlaða avrokningin fyri 2008, sum nú verður kravd inn, er 158 mió krónur í ár. Í fjør var talið 386 milliónir. Tað gevur eina samlaða minniinntøku á 218 milliónir. Av hesum er minniintøkan hjá kommununum 87 milliónir.

Hartil skal havast í huga, at fleiri kommunur valdu at hækka skattaprosentið, tá fíggjarætlanirnar fyri 2009 vórðu gjørdar. Og eisini í landsskattinum varð broyting framd. Ein broyting, sum sambært forsagnunum skuldi geva 30 milliónir eyka í landsskatti.

### FAKTA

**(í tkr)**
**Persónsskatturin**
**Fyri oktober**

| | 2008 | 2009 | munur | % |
|---|---|---|---|---|
| Kommunur | 114.007 | 107.826 | -6.181 | -5,4% |
| Land | 119.743 | 114.271 | -5.471 | -4,6% |

**Januar til oktober**

| | 2008 | 2009 | munur | % |
|---|---|---|---|---|
| Kommunur | 1.098.972 | 1.064.331 | -34.640 | -3,2% |
| Land | 1.153.382 | 1.136.435 | -16.947 | -1,4% |

**Partafelagsskattur**

| | 2008 | 2009 | munur | % |
|---|---|---|---|---|
| Kommunur | 146.812 | 60.083 | -86.729 | -59,1% |
| Land | 239.537 | 98.031 | -141.506 | -59,1% |



*Bæði tá ætlanin fyri 2009 varð gjørd, og tá hendan varð eftirmett í juni, vórðu fleiri og stórar skerjingar framdar í rakstrinum hjá Tórshavnar Kommunu*

# Hava skorið nógv niður

**Tórshavnar Kommunu hevur eina samlaða minninn tøku í skatti upp á góðar 60 milliónir. Hetta er tó ikki nakað, sum slær botnin undan kommunukassanum, sigur kommunustjórin**

BÚSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

61 milliónir minni í kommunukassan. Tað er status hjá Tórshavnar Kommunu, tá tølini fyri kommunalar skattainntøkur í 2009 verða lisin.

Valigi persónsskatturin gevur høvuðsstaðnum eina minniinntøku á góðar 11 milliónir, og hartil er partafelagsskatturin fyri 2008 – sum verður innkravdur nú – 50 milliónir lægri, enn hann var fyri 2007.

- Hetta eru stórar lækkingar, men vit hava í stóran mun lagt upp fyri hesum í arbeiðinum við at gera smíða fíggjarætlan, sigur Ingibjørt Berg, kommunustjóri.

- Longu tá fíggjarætlanin varð gjørd, høvdu vit lækkað inntøkumetingarnar heilt nógv. Og tá vit í vár sóu greið tekin um, at inntøkurnar helst lækkaðu enn meira, vórðu fleiri sparingar framdar í rakstrinum. Tí er støðan í dag, at tað er hampuliga gott samsvar millum ætlað og staðfest tøl, sigur Ingibjørg Berg, sum leggur afturat, at gjaldførið hjá kommununi á ongan hátt er hótt.